

# HANN SKAL GERA STANDMYND AV **ÓLAVI Á HEYGUM**

**NORSKI** MYNDAHØGGARIN, **PER UNG**, HEVUR FINGIÐ LITIÐ UPP Í **HENDI** AT GERA STANDMYND AV **ÓLAVI Á HEYGUM** Í VESTMANNA. TANN 77 ÁRA GAMLI **MYNDAHØGGARIN** HEVUR FRAMMANUNDAN GJØRT **STANDMYNDIR** AV BÆÐI JESUSI OG FRIDTJOFI NANSEN, OG TÁ HANN SÁ **MYND** AV ÓLAVI Á HEYGUM Í STAVNHETTU OG **SJÓSTÚKU**, IVAÐIST HANN IKKI Í, HVUSSU **STANDMYNDIN** SKULDI SÍGGJA ÚT. – HANN VAR EIN FATTUR **FRAMTAKSMAÐUR**, OG SOLEIÐIS VERÐUR STANDMYNDIN **EISINI**, SIGUR PER UNG



**LISTAVERK**

Uni Arge
uniarge@gmail.com

Fyri tveimum vikum síðan var royndi myndahøggarin úr Oslo og hugdi at plássinum á Heygum í Vestmanna, har nýggj standmynd av Ólavi á Heygum skal standa. Finnbogi Christiansen, Ólavur Hátún og aðrir í einum áhugabólki standa fyri ætlanini at fáa standmyndina gjørda, og teir hava greitt Per Ung frá, hvør Ólavur á Heygum var, hvat hann tókst við, og hvussu hann sá út.

Ólavur á Heygum, ið varð føddur í 1866, var sjáldsama virkin maður. Hann bygdi handilshús á Heyganesi í Vestmanna og gekk undan at fáa vestmenningum skip og sleipistøð. Eisini tók hann stig til at stovna Føroya Banka, keypti fyrsta føroyska trolaran, Lord Alfred Paget, fekk í lag telefonsamband millum Vestmanna og Havnina og tók stig til at framleiða streym burtur úr vatnorku í Fossá í Vestmanna.

Framtakshugaði vestmenningurin hevði tó ikki bara viðgongd í sínum lívi. Tá pengar skuldu setast í Føroya Banka, komu føroyingar bara við fimm prosentum av neyðuga partapeninginum. Trolarakeypið gjørdist honum ein dýr søga, og hørð mótstøða var í løgtinginum ímóti, at júst Ólavur á Heygum skuldi standa á odda fyri ætlanini at framleiða ravmagn í Fossá.

Jóannes Patursson stuðlaði allatíðina Ólavi á Heygum, men mótstøðan ímóti honum í Dimmalætting var hørð, og danskir embætismenn í Havn settu føtur í spenni ímóti ravmagnsætlanini og komu til ta niðurstøðu, at Ólavur á Heygum var ikki álitismaður. Í 1921 hevði hann í 15 ár strongt á at fáa gjørt vatnorkuverk í Fossá, men tá varð honum endaliga sýtt at fara undir ætlanina, og í 1923 doyði hann.

> Ego varð smittaður sum av sjúku av mongu standmyndunum í Oslo, og tær vóru orsøkin til, at eg sjálvur vildi gerast myndahøggari

## Nansen fyrst

Minnið um Ólav á Heygum skal tó sleppa at liva, halda vestmenningar, og tí hava teir gjørt av at reisa standmynd av honum á Heygum, har hann fer at skoða út yvir Heyganes og sleipistøðina, ið hann læt gera. Stavnhettan og sjóstúkan bera boð um ein mann, ið hugsaði stórt, sigur Per Ung, tá vit hitta hann á Hvonn í Vágsbotni, har hann kveitir yvir á standmyndina av Nólsoyar Páli.

– Eg havi koyrt runt í Føroyum og sæð nógvar standmyndir. Her eru nógvar góðar, og Hans Pauli Olsen er ein sera dugnaligur myndahøggari. Føroyar eru hepnar at eiga ein so hugflogsríkan myndahøggara, sigur Per Ung, sum gjørdi sínar fyrstu standmyndir í 50'unum og sostatt er ein av royndastu norðurlendsku myndahøggarunum yvirhøvur.

Standmyndin av Ólavi á Heygum verður góðar tveir metrar høg, og gongur alt sum ætlað við fíggingini, verður hon liðug á ólavsøku um tvey ár. Per Ung hevur tvær standmyndir at gera, áðrenn hann fer undir standmyndina av slóðaranum í Vestmanna. Onnur er av Fridtjofi Nansen á eldri árum, tá polarfararin var vorðin politikari, og frammanundan hevur hann gjørt eina standmynd av Nansen á yngri árum.

– Eg arbeiði við fleiri verkum í senn, og eisini gera eg og kona mín í løtuni eitt astrologiskt ur, sum skal standa við høvuðsgøtuna í Oslo, Carl Johan. Býarlív hevur altíð givið mær stóran íblástur. Eg varð upprunaliga smittaður sum av sjúku, tá eg sá mongu standmyndirnar í Oslo, og tær vóru orsøkin til, at eg sjálvur vildi gerast myndahøggari, sigur Per Ung.

## Klassiskan íblástur

Per Ung hevur sjáldan verið lovprísaður í ummælum, tí í eini ummælaraverð, sum áhaldandi vil síggja skeivar modernistiskar vinklar, verður hildið, at klassiski stílurin hjá Per Ung leggur lítið nýtt aftrat tí, sum grikskir og romverskir myndahøggarar avrikaðu. Kortini hevur Per Ung ongantíð vikið frá sínum klassiska íblástri, og ein av hansara heilt stóru fyrimyndum er Michelangelo.

– Eg eri fyrst og fremst hugtikin av